# Kunngerðablaðið A

2012 Hefti 1

ISSN 0907-905X


Nr. 1 — 10. januar 2012

**Kunngerð um broyting í kunngerð um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum**

**§ 1**

Í § 1, nr. 7 í kunngerð nr. 4 frá 9. februar 2006 um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum verður aftaná “línuveiða” sett: “og snelluveiða”.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 10. januar 2012

**Jákup Mikkelsen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Nr. 2 10. januar 2012

**Kunngerð**
**um**
**virksemi hjá Húsalánsgrunninum at útvega bústaðir**

Við heimild í § 5 b, stk. 2 í løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010, sum broytt við løgtingslóg nr. 140 frá 6. oktober 2011 verður ásett:

**§ 1.** Áðrenn Húsalánsgrunnurin fer undir virksemi at útvega bústaðir skal í hvørjum einstøkum føri tilfar vera tøkt, ið lýsir verkætlanina, fevnandi um m.a.:
1) tekningar
2) kostnaðarætlan og fíggjarætlan, og
3) onnur skjøl og tilfar, sum grunnurin heldur verða neyðug til tess at gera eina heildarmeting um verkætlanina

**§ 2.** Fyri hvønn einstakan íbúðastovn/-felag skulu gerast viðtøkur, ið skulu góðkennast av stýrinum fyri Húsalánsgrunnin.
*Stk. 2.* Viðtøkurnar skulu m.a. áseta, hvørt talan er um luta- ella leiguíbúðir.
*Stk. 3.* Viðtøkurnar skulu m.a. fevna um:
1) reglugerð fyri roknskap,
2) ársaðalfund,
3) grannskoðan,
4) nevnd ella stýrið, og
5) hvussu verður við ognunum hjá felagnum og ella stovninum, um virksemið steðgar ella felagið og ella stovnurin verður tikin av.

**§ 4.** Húsalánsgrunnurin kann seta byggitøknilig krøv til byggjarí, krøv til orkunýtslu, stødd, dygd o.a.

**§ 5.** Húsalánsgrunnurin tekur avgerð um luttøku í verkætlanum við støði í einari heildarmeting um m.a. fíggjarligu útlitini, tørvin á slíkum bústøðum og luttakandi samstarvspørtum.

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fíggjarmálaráðið, 10. januar 2012

**Jørgen Niclasen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Mortan Simonsen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705